

# Posta Stamps
## Føroyar

Nr. 32
Mai 2017

ISSN 1603-0036

- Sepac 2017: Føroyskur knívur
- Trúbótin 500 ár
- Føroysk klæðir II
- Postgjaldsmerki 2017: Føroyar í litum

Posta
FAROE ISLANDS




FO 868 Royndarprent







FO 867

# SEPAC 2017: Føroyskur knívur

**Knívleysur er lívleysur maður**

Løgið við hugasambandi. Sum eg siti her og júst havi skrivað yvirskriftina til hendan tekstin, dagar eitt av mínum allarfyrstu barnaminnum fram í huganum. Eg má hava verið umleið 4 ára gamal og stóð á einum krakki í køkinum við einum felliknívi í hondini. Pápi mín, sum um tað mundið var í Kanada fyri at læra fiskimenn á staðnum at brúka eitt nútímans línuskip, hevði sent pakka heim við smáum gávum til okkum børn. Til mín hevði hann keypt ein fínan reyðan felliknív við skjaldramerki á skaftinum – og tað var hendan knívin, eg júst hevði tikið úr skápinum.

Minnist ikki meira til knívin, og hvat seinni varð av honum. Men tann dagin varð hann tikin frá mær, tí eg brúkti hann til at telgja eitt av drápuligu træsvørðunum hjá eldru brøðrunum um til ein breyðknív – og, má sigast, tað vinarbragdið fall ikki í góða jørð.

Í dag kann tað kanska tykjast undarligt, at geva sínum fýra ára gamla soni ein felliknív sum gávu. Men tíð, mentan og umstøður, tá fyrst í sekstiárunum, vóru øðrvísi, so onki løgið í tí.

Knívurin hevur allar tíðir verið fremsta amboð føroyinga. Gamla orðafelli, *"knívleysur er lívleysur maður"* sipar til áneyðir, altíð at hava knív uppi á sær í tí dagliga. Knívurin varð nýttur til næstan alt arbeiði í gamla bónda- og veiðimannasamfelagnum, bæði av monnum, kvinnum og børnum.

Knívurin varð nýttur til at eta við – næstan allur siðbundin føroyskur matur krevur ein hvassan knív – og sami knívur varð nýttur



Sambært søguni, átti Nólsoyar
Páll, (1766 – 1808/09) hendan knívin. Mynd: Fotostudio.

til putl og arbeiði í gerandisdegnum. Hann varð nýttur til at svæva seyð, neyt og hval – og til fletting ella uppskering aftaná. Hann kundi ikki verast fyri uttan á floti – maður, ið gloymdi knívin eftir heima við hús, kundi vænta at verða happaður og argaður av sínum bátsfeløgum. Knívurin varð nýttur til at telgja og umvæla reiðskap og amboð, til bygging, hagreiðing av skinni og til framleiðslu av klæði og skóm. Fríløturnar varð knívurin eisini tikin fram – ein partur av tí, ið liggur eftir sum okkara fornfrøðiligi mentanararvur, er amboð, leikur og prýðislutir, telgt og útskorið í glæmuni frá kolunum longu vetrarkvøldini.

Knívurin var, snøgt sagt, mest henta og umfatandi amboð ið føroyingar høvdu.

Siðbundni føroyski knívurin er ein gerandisknívur og hevur tí eitt lutfalsliga stutt blað. Fremsta eyðkenni er brotið á bakkanum ið ger at knívsblaðið hellur meira oman móti oddinum, enn knívar aðrastaðnis frá. Hendan hellingin er allarhelst úrslit av aldargomlum royndum – og leggur vøgustøðuna miðskeiðis á knívsblaðið - møguliga tí at knívurin skuldi brúkast at svæva við og ikki skuldi gleppa meðan arbeitt varð.

Knívsbløðini vórðu vanliga smíðað av føroyskum jarnsmiðum. Eggin var ofta innlagt stál, meðan restin av blaðnum var av bleytari tilfari, fyri at vera lættari at brýna. Skeftið var vanliga úr træi, uttan nakað slag av skreyti – og slíðrin úr viði ella leðri.

Miðskeiðis í nítjandu øld, fór dugnaligi listhandverkarin Jákup Andrias Andrasson,



Skreytknívur, gjørdur úr myrkum træi, messing og perlumóðir. Knívurin er 20,2 cm langur og smíðað hevur Ludvig Blåsvær fyrst í 20. øld. Foto: Fotostudio.

(f. 1819), at gera knívsskefti og slíðrar av mahogni ella ibenholt, við smáum útskornum prýðismyndum frá gerandislívinum. Motivini vóru oftast bátur, grindahvalur og ymisk veiðiamboð – úr kopari, silvuri ella perlumóðir. Hetta listhandverkið fekk góða undirtøku millum føroyingar, varð skjótt tikið upp av øðrum listhandverkarum og er framvegis sera væl umtókt. Tað finst neyvan eitt hús í Føroyum, har tú ikki finnur ein skreytknív ella annað siðbundið amboð við snotiliga innløgdum skreytmyndum.

Knívurin á frímerkinum hevur staðið sum ein vanligur brúksknívur (19,5 cm), men tað vakurt útskornað knívsskeftið og slíðrin, við báti, hvali og grindareiðskapi úr messing, avdúkar, at hetta er ein skreytknívur. Sambært søguni, átti Nólsoyar Páll (1766 – 1808/09) hendan knívin. Um so er, er knívurin eldri enn man vanliga metir prýðisknívar av hesum slagnum at vera. Hvørt knívurin seinni hevur fingið nýtt skefti og slíðra ella hann, sum søgan sigur, varð gjørdur av einum smiði í Porkeri, sum var javnaldri Páls, skal eg ikki taka støðu til her. Knívurin er í hvussu er ein av teimum elstu og best varðveittu skreytknívum í Føroyum í dag.

*Anker Eli Petersen*










# Ársins vakrasta frímerki 2016

Frímerkjasavnarar kring allan heim hava atkvøtt millum føroysku frímerkini, ið vórðu givin út í 2016 og úrslitið gjørdist hetta:

Nr. 1
Toskaskræða. FO 834.
Listafólk: Martin Mörck.

Nr. 2
Sepac 2016: Árstíðir. FO 827.
Listafólk: Edward Fuglø.

Nr. 3
Westerbeek 1742. FO 822-23,
Listafólk: Anker Eli Petersen.

Hepnu vinnararnir eru:

1) Føroyskt garvað seyðaskinn:
Jaka Sifrar, Slovenia

2) Árbók 2016:
Karl F. Dehlendorf, Danmark

3) Toskaskræðumappa:
Heinz Jakobsmeier, Týskland

4) Ársmappa 2015:
Yuli, Xian, Kina

Vit ynskja vinnarunum til lukku og takka fyri luttøkuna.




FO 869




Royndarprent




# Trúbótin 500 ár

**Martin Luther og tær 95 tesurnar**

Lítið mundi hann gruna tað vespureiður hann var við at stinga hondina í, tann góði Martin Luther, tá hann, tann 31. oktobur 1517, sló sínar 95 tesur upp á dyrnar til Slotskirkjuna í Wittenberg í Týsklandi. Ei heldur øsingina, ið lá fyri framman og tær umfatandi avleiðingar, ið eftirhondini skuldu standast av gerðini.

Tað hevði higartil ikki verið nakað, ið bendi á, at munkurin, presturin og professarin í gudfrøði í Wittenberg, skuldi vinna sær sess millum tey mest eyðsýndu stórmenni í heimssøguni. Gløggi námsarbeiðarasonurin, føddur tann 10. novembur 1483 í Eisleben, hevði gingið í góðum skúla. Eftir at hava staðið filosofikum á lærda háskúlanum í Erfurt, skuldi hann, eftir faðir síns ynski, hava lisið jura. Men eftir eina skelkandi upp-living í toruveðri, hevði hann lovað at fara í kleystur og gerðast munkur. Hann var nú 33 ára gamal, og stóð, ótilvitandi, á gáttini til ógvusligar broytingar í lívinum.

**Avlátsspurningurin**

Sum avleiðing av hugmyndunum hjá katól-sku kirkjuni viðvíkjandi revsing eftir deyðan, fyri syndir framdar í lívinum, hevði eitt hugtak stungið seg upp í miðøldini, ið van-liga kallaðist avlát. Eftir deyðan vóru tveir møguleikar – tey óndu endaðu í helviti í allar ævir, meðan tey, ið høvdu livað eitt sámuligt lív, komu til himmals. Trupulleikin var tó, at ongin menniskja kann siga seg fría fyri synd, so fyri at sleppa inn um himnagrindir, skuldi man skrifta, t.v.s. viðganga dagligar syndir, fyri einum presti og taka við og fremja tann bótsgerning, ið man fekk álagdan. Eftir deyðan skuldi einstaklingurin so eisini standa eina tíðaravmarkaða revsing í skerseldinum. Tíðin í skerseldinum var treytað av hvussu umfatandi og álvarsamar syndirnar vóru.



Luther goymdi seg á borgini Wartburg
undir navninum, Junker Jörg, til í mars 1522.

Hugskotið við avláti var at sleppa lættari undan bótsgerningunum – og harafturat ein háttur at sleppa skjótari gjøgnum tað, heldur ótespuliga, men óumberiliga uppihaldið í reinsandi skerseldinum. Við at lata kirkjuni olmussu, yvirtók kirkjan bótsgerningin – og soleiðis kundi ein gjalda fyri at onnur, t.v.s. klerkastættin kundi liva eitt lív í játtan, bøn og kollektivari iðran.

**Tá pengarnir í kistil smella...**

Stutt frammanundan, hevði erkibispurin í Mainz, Albrecht av Brandenburg, fingið loyvi frá Leo 10. páva, at selja avlátsbrøv í sínum bispadømi. Hetta var treytað av at pávin fekk helvtina av inntøkuni til byggingina av nýggju Pæturskirkjuni í Róm. Ónøgd hevði tó tikið seg upp yvir ágangandi framferðarháttin hjá sølumonnunum mótvegis vanliga fólkinum. Kendasti av hesum sølumonnum var dominikanaramunkurin Johann Tetzel, ið hevði sans fyri tí teatralska. Undir krosstekni og við fylgi, marsjeraði Tetzel inn í bygdirnar, helt eina dundurprædiku um ómetaligu pínsluna í skerseldinum – og bjóðaði síðan áhoyrarunum at keypa avlátsbrøv til sín sjálvan – og enntá til ættfólk ið longu vóru deyð. Tí, sum Tetzel tók til: *"Tá pengarnir í kistil smella, sálirnar úr skerseldi fella!"*

**Tesurnar á kirkjugrind**

Tá Martin Luther í 1517 hoyrdi um framferðina hjá Tetzel, helt hann at hetta var vert at kjakast um. Hann skrivaði 95 tesur viðvíkjandi avlátshandlinum og sendi tær til erkibispin og nakrar av sínum lærdu starvsfeløgum. Harafturat sló hann tesurnar upp á kirkjudyrnar í Slotskirkjuni í Wittenberg, sum inngangsrøða til eitt akademiskt kjak um avlátsspurningin.

Eftir øllum at døma óvitandi um leiklutin hjá erkibispi og pávastólinum í søluátakinum, kom Luther av óvart at traðka á eymar føtur.



In Vollmacht aller Heiligen
und in Erbarmung gegen Dich, absolvire
Ich Dich von allen Sünden und Missetha-
ten und erlasse Dir alle Strafen auf zehn
Tage.
Johannes Tietzel.



T.v.: Avlátsbræv, sum Johann Tetzel hevur undirskrivað. T.h.: Johann Tetzel selur avlátsbrøv.

Ikki so at skilja, at tað var nakað avgerðandi ella kollveltandi í tesunum. Luther avnoktaði ikki sjálvan avlátshugburðin. Tað vóru heldur pástandirnir hjá sølumonnunum um, at ein kundi keypa Guds vælvild, umvegis avlátsbrøv frá pávanum, og at man kundi bøta um korini hjá teimum farnu í skerseldinum, hann fanst at – og tað var Luther ikki eina um at halda.

Uppslagið á kirkjudyrnar var skrivað á latíni og var helst bara ætlað teimum lærdu, til hugkveiking og kjak. Men tað vardi ikki leingi fyrr enn onkur hevði umsett tekstin til týskt - og hesa tíðina, stutt eftir at Gutenberg í 1440 uppfann prentpressuna, hevði tað ikki nógv upp á seg at prenta tekstin í stórum upplagi. Brátt vóru tær 95 tesurnar kendar yvir alt Týskland, har tær, til undran fyri Luther, vaktu miklan ans. Hann sendi eitt bræv til erkibispin í Mainz, har hann bað um umbering og viðgekk, at hann var farin ov langt í ávísum pørtum. Bispurin sendi brævið víðari til pávan – og hettar varð byrjanin til kirkjuligu andgerðirnar mótvegis Luther.

**Trýstið mennist**

Trýstið kom úr ymsum heraðshornum. Óbeinleiðis á munkalagið og við beinleiðis samrøðum millum Luther og kardinalarnar. Luther var, satt at siga, bilsin av reaktiónini hjá kirkjuni og hetta fekk hann til at halda upp ímóti. Í oktober 1518 varð Luther tráspurdur av Cajetan kardinali í Augsburg, men vildi ikki slaka fyri trýstinum. Eitt ár var liðið síðan hann hevði almannakunngjørt tesurnar – stuðulin til Luther var vaksin, bæði frá fúrstunum og vanliga fólkinum – og kirkjan metti nú tann treiska munkin sum eina hóttan.

**Kjakfundurin í Leipzig**

Tann 8. november 1518 almannakunngjørdi kirkjan pávabrævið *"Cum postquam"*, har tann katólska avlátslæran varð viðgjørd. Pávin viðgekk ávís ósamsvar viðvíkjandi avlátshandlinum, men vísti prinsippiellu sjónarmiðunum hjá Luther aftur. Kjakið var við at fara av sporinum og báðir partar fluttu seg alsamt longur frá upprunaligu kjarnuni í málinum, teimum 95 tesunum.



Býurin, Wittenberg á døgum Luther.

Á einum kjakfundi í 1519 í Leipzig, millum umboð fyri lærdu háskúlarnar í Leipzig og Wittenberg, legði kendi gudfrøðingurin Johannes Eck beinleiðis eftir Luther og vildi vera við at hann setti spurnartekin við vald pávans, lýtaloysi hjá kirkjufundunum og kirkjuligu sakramentini. Luther svaraði fyri seg, at vald pávans saknaði grundgeving í Bíbliuni og at kirkjufundirnir ikki kundu siga seg lýtaleysar. Eck økti um trýstið á Luther, við at samanbera hann við Jan Hus, sum øldina frammanundan varð brendur á báli fyri at siga, at pávin saktans kundi fara skeivur - og annað ið kundi minna um útsagnir Luthers. Tað fekk Luther at siga tey kendu orðini: "*Ja, ich bin Hussite*," og harvið vendist ikki aftur.

Kjakið í Leipzig herdi støðutakanina hjá Martin Luther mótvegis pávanum. Higartil hevði hann ikki mett sína støðutakan vera í andsøgn mótvegis kirkjuni ella valdinum hjá pávanum – men eftir kjakfundin byrjaði Luther at samanbera pávan við Antikrist.

**Exsurge Domine**

Í juni 1520 kom pávabrævið Exsurge Domine frá Leo 10. páva. Johannes Eck fekk álagt at lýsa pávabrævið í Týsklandi, sum fordømdi 41 trúarsetningar í skriftum Luthers – og kravdi at hann skuldi taka frástøðu frá teimum innan 60 dagar, ella taka við ekskommunikatión. Tað var ikki nøkur løtt avbjóðing hjá Eck – hann kom undir harðar atfinningar nógva staðni – og aðrastaðni fekk hann ikki so frægt sum lýst pávabrævið. Luther var sera væl umtóktur, bæði av vanligum fólki og av teimum ráðandi fúrstunum. Hann svaraði upp á pávabrævið við at brenna tað alment í Wittenberg, saman við skriftum hjá mótstøðufólki og kirkjuligum rættarbókum.



Mætasti stuðulsmaður Luthers,
fúrstin Fríðrikur hin vísi av Sakslandi.

**Ríkisdagurin í Worms**

Brotið frá kirkjuni var nú veruleiki. Tann 3. januar 1521 varð Martin Luther lýstur í bann av pávanum. Kirkjan kundi ikki sjálv draga tann treiska uppreistrarmannin fyri rættin, so tað var tann ungi Karl 5. keisari, sum reisti sakarmálið.

Mætasti stuðulsmaður Luthers, var fúrstin Fríðrikur hin vísi av Sakslandi. Hann fekk keisaran at ganga við til, at Luther, áðrenn hann varð dømdur, skuldi svara spurningum frá ríkisdegnum – og at Luther fekk loyvi frítt at fara til og frá Worms.

Tann 18. apríl 1521 møtti Martin Luther fyri ríkisdegnum í Worms. Gamli mótstøðumaður hansara, Johannes Eck, umboðaði keisaran og vísti Luther á eitt borð í salinum har skriftir hansara lógu samlaðar. Eck spurdi um skriftirnar vóru hansara verk og um hann vildi standa við ábyrgdini fyri tær. Luther váttaði at skriftirnar vóru hansara verk, men bað um tíð at umhugsa hin spurningin. Dagin eftir svaraði hann, at hann tók ábyrgdina av innihaldinum í skriftunum og endaði við at siga: *"Eg hvørki kann ella vil frásiga mær nakað, tí tað er hvørki víst ella ráðiligt at virka ímóti egnari samvitsku. So hjálpi mær Gud. Amen!"*

Næstu fimm dagarnar kjakaðist ríkisdagurin sínámillum fyri at staðfesta lagnu Luthers – og 25. mai las keisarin dómin. Martin Luther varð lýstur friðleysur at vera, hansara skriftir skuldu bannast og hann sjálvur takast á hondum. Sambært boðorðunum var tað eisini ein brotsgerð at hjálpa Luther, og at geva honum mat ella innivist.

**Wartburg**

Av tí at keisarin hevði lovað Martin Luther frítt at fara, kundi hann ikki handtakast á staðnum. Luther fór úr Worms, men ávegis til Wittenberg varð hann burturførdur av hermonnum hjá Fríðriki vísa og førdur til borgina Wartburg í Eisenach. Undir dulnavninum *Junker Jörg*, fjaldi hann seg á borgini til



Wartburg borgin í Eisenach.

mars 1522. Tað var her á Wartburg, at hann fór undir at umseta Nýggja Testamenti til týskt – og hendan umsetingin gjørdist ein varði í týskari málsøgu - og grundarlag fyri hátýskum. Tað tók nøkur ár hjá honum at umseta Gamla Testamenti eisini, men í 1534 lá fyrsta týska Bíblian klár.

Sum fyrr nevnt, kom Martin Luther ikki undan kavi aftur fyrr enn í mars 1522. Orsøkin til tess var, at ruðulleiki varð uppstaðin í kjalarvørrinum av teimum kollveltingum ið Luther hevði íbirt. So hann noyddist at venda aftur til Wittenberg fyri at fáa skil á støðuni.

Upp gjøgnum 1520'ini, menti Martin Luther tær grundleggjandi meginreglurnar fyri reformeraðu kirkjuna – katekismuna, etikkin, kirkjuhugtakið o. s. fr. Tann protestantiska fólkakirkjan varð staðfest í stuttum lættlisnum smáskriftum, sum vanligt fólk lætt kundi skilja og taka til sín.

Tað vísti seg brátt, at reformeraða kristna frælsi eisini kundi tulkast á annan hátt enn Luther hevði hugsað sær – og brátt uppstóðu bólkar, ið bygdu víðari á lærusetningar hansara. Hetta førdi eisini til meira ógvusligar avleiðingar, sum Thomas Müntzer og hansara bóndauppreistur vóru atvoldin til frá 1524 til 1526. Men Martin Luther vendi sær harðliga móti rákinum, at brúka hansara reformatión til at kollvelta samfelagið.

Trúbótin breiddi seg, serliga í Norðurevropa, men tann søgan má bíða til eina aðra ferð. Frásøgnin um munkin ið vildi kjakast, men endaði við einari trúbót, hevur nú 500 ár á baki, og onki bendur á at hon fer at enda í bræði – so vit steðga her.

*Anker Eli Petersen*







FO 870-871

Royndarprent




# Føroysk klæðir II

Í hesari útgávuni um føroyska tjóðbúnan viðgera vit pløggini undir belti - skjúrt, buksur, hosur og skógvar.

## Kvinnubúnin

**Skjúrtið**

Siðbundna skjúrtið í dag er eitt spølaskjúrt, t.v.s. svart og reyð- ella bláteinut. Klædnatilfarið var "hvergarn", blandingsdúkur, upprunaliga av lín og ull, nú maskinvovin bummull og ull. Tað hava verið atfinningar at rákinum fyri tíðina, at, serliga ungar kvinnur, hava valt aðrar litir, t.d. svart og grønteinut ella svart og gulteinut.

Men frá keldunum vita vit, at skjúrtini fyrr í tíðini høvdu fleiri ymsar litir. Jørgen Landt prestur (1751 – 1904) sigur í sínari "*Færøbeskrivelse*" frá 1800, at gerandisskjúrtini vóru brún við hvítum teinum og gulteinut til fínari brúk. Skræddarin, Hans Marius Debes (1888 – 1978) skrivar, at skjúrtini fyrr høvdu myrkabláan botn, heldur enn svartan, við ljósabláum, hvítum, reyðum, gulum ella grønum teinum. Debes veit eisini at siga, at skjúrtið skuldi hava 13 legdir hvørju megin - og at miðlegdin framman skuldi vera stuttasponn (uml. 6 tummar) breið. Tað var vanligt at gentur fingu skjúrtið við fermingaraldur, og tí skuldi tað hava legdir at leggja út so hvørt sum likamið broyttist.

**Fyriklæðið**

Fyriklæðið er sjálvsagt ein leivd frá gamla gerandisbúnanum, fyri at verja skjúrtið móti skitti og sliti. Tað var lættari at vaska fyriklæðið enn sjálvt skjúrtið – og fyriklæðið kann skiftast í einum handarbragdi.



Kvinnur í føroyskum klæðum á ólavsøku. Mynd: Ólavur Frederiksen.

Tjóðminnafrøðingurin, J. C. Svabo (1746 – 1824) veit at siga, at fyriklæðini vóru av bláteinutum lørifti, meðan H. M. Debes, eini 200 ár seinni, sigur, at tey vóru av fínt vovnum blandingsdúki, ull og bummull, silki ella líknandi klæði.

Fyrr vóru fyriklæðini annars stytri enn í dag, nú tey einans verða borin til pynt. Nógv verður gjørt burturúr ornamentala prýðinum á fyriklæðinum, sum helst eisini skal passa til turriklæðið.

**Sokkar og skógvar**

Undir skjúrtinum vóru gentur og kvinnur í svørtum ella gráum sokkum, allarhelst bundnir av føroyskum garni. Síðan eru sokkarnir vorðnir fínari, silki ella nylon – og í dag verða nylonsokkar ella sokkabuksur nýttar.

Skógvarnir vóru upprunaliga húðarskógvar ella rotuskógvar og tuflur ella galosjur. Harafturat hava tær ivaleyst eisini nýtt útlendskar skógvar til fínari brúk.

Skógvarnir í dag eru oftast hálvhøgir svartaskógvar við breiðum silvurspenni.

## Mansbúnin

**Buksurnar**

Ein tann mest eyðsýndi luturin í mansbúnanum, eru tær svørtu knæbuksurnar. J. C. Svabo hevur eina heldur skemtingarsama lýsing av brókunum á hansara døgum og skrivar, at tær eru svartar og víðar, opnar undir knøunum og og knýttar við tveingjum. Fyri framman er splitta uttan knappar, sum altíð stendur opin, og er dekan og sjónlig orsakað av hvítu stúkuni. Tað hevði sæð betur út, heldur Svabo, um menn skiftu til



Hosubond í ymiskum litum.
Mynd: Posta.

buksur við klaffi framman, men hann ivast í at tað nakrantíð fer at henda.

Men broytingin kom hóast alt. Í dag hava buksurnar klaffa fyri framman, sum verður hildin uppi av silvurknappum á hvørjari síðu. Buksurnar liggja eisini tættari at í dag, eru úr svørtum vaðmali og hava harumframt skarð við knøini, ið verða knept við silvurknappum.

Orsøkin til at menn, eftir gomlum siði, brúktu knæbuksur er, at tað var lættari at skifta hosur enn buksur. Tá menn komu heim eftir lokið dagsverk, vóru teir ofta vátir um føturnar og upp eftir legginum.

**Hosurnar**

Hosurnar eru langar, røkka upp um knøini og verða hildnar uppi við marglittum flættaðum hosubandi. Hosurnar vóru frá gamlari tíð oftast morreyðar ella gráar. Til halgu og veitslu vóru hosurnar ofta bláar ella hvítar – og tað er enn galdandi. Hosurnar á nútíðarbúnanum eru oftast bláar, men kunna eisini vera hvítar ella morreyðar.

**Skógvar**

Fyrr gingu menn altíð í húðarskóm, við longum tveingjum, ið vóru knýttar á legginum. Til fínari brúk hevur onkur kanska havt útlendskar skógvar, men tað hevur verið sjáldsamt.

So hvørt sum tjóðbúnin breyt frá gerandisklæðunum tá seinast í 19. øld, fóru menn eisini at brúka "danskar skógvar" - fínari svartaskógvar úr lakk ella leðri við breiðum silvurspenni, ofta skrýtt við útskornum skreyti.

*Anker Eli Petersen*







Maksimumkort: 40,50 kr.




Fyrstadagsbjálvi við røð: 31,50 kr.




Sjálvklistrandi hefti: 79,50 kr.




# Gullbrúdleypsmappa

Tann 10. juni í ár kunnu Margreta drotning og Heindrikur prinsur halda gullbrúdleyp.




Hetta hevur Posta valt at hátíðarhalda við einum smáarki, ið vísir eina mynd av drotningaparinum uttan skreyt og skrúð.

Hetta er ein felagsútgáva saman við Danmark og Grønlandi, sum eisini geva hetta smáarkið út – og verður ríkisfelagsskapurin ímyndaður á arkinum við einum veðri, einum svana og einari ísbjørn.




Posta gevur somuleiðis út eina snøgga mappu við øllum trimum smáørkunum í - tí føroyska, danska og grønlendska.

Útgávudagur: 15.05.2017








Ovast: Drotning Margreta og Heindrikur krúnprinsur saman við synunum Joachim prinsi og Fríðriki krúnprinsi á vitjan í Føroyum í 1978. Mynd: Scanpix.

Vinstrumegin: Drotning Margreta og Heindrikur prinsur á vitjan í Føroyum í 2010. Mynd: Scanpix.




# Postgjaldsmerki 2017: Føroyar í litum

Miriam Hinz, grafikari, hevur sniðgivið hesi fýra nýggju postgjaldsmerkini.

Miriam hevur seinastu tvey árini arbeitt nógv við at sniðgeva nýggjar føroyskar plakatir. Hon teknar tær í telduni, og hugskotini til myndevni heintar hon víða hvar í føroyska landslagnum, bygdar- og býarmyndum, í náttúruni og føroyskum metanarligum siðvenjum. Hennara plakatlist kann síggjast og keypast á www.einfalt.fo.

Føroyar eru oyggjaland, ið liggur á staðsetingini 62 norður og 07 vestur.

Søgukøn vilja vera við, at navnið á oyggjunum sipar til nógva seyðin, ið oyggjarnar eru kendar fyri. Í øllum førum eru tað tvífalt so nógvir seyðir, sum tað eru fólk, og seyður sigst hava verið eins leingi á oyggjunum, og tað hava verið fólk. *'Grønar vakrar oyggjar, hetta landið eiga vit'*, syngur skaldið - tað er altíð nóg mikið av grasi til tann nógva seyðin.

Ímillum gras og annan vøkstur sæst tjóðarblóman sóljan. Sangurin um sóljugentuna er heiðranin til várið, og sóljan er eitt tað fyrsta teknið um, at ljósari tíðir eru fyri framman. Sóljurnar síggjast oftast í stórum tali og seta sítt serliga prýði á landslagið.

*Merkið*, flagg Føroya er eitt sokallað krossmerki, og sniðið sipar til kristindómin eins og hjá flestu av hinum norðurlendsku londunum. Litirnir eru hvítt, reytt og blátt, og á Flaggdegnum syngja vit: *'Sjá, tú blánar sum*




*loftið og tú rodnar sum blóð, men hitt hvíta er fossur, brot og vetrarins ljóð'.*

Hvíti botnliturin kann eisini vera klári himmalin og hvíta aldubrotið, tá ið tað brýtur í klettin. Og reytt og blátt eru litir, sum eisini finnast í siðbundnum føroyskum húgvum, umframt at litirnir vísa sambandið til Íslands og Noregs, sum brúka somu litir í sínum fløggum.

# Nýggjar útgávur - 8. september og 2. oktober 2017


FO 865-866

***SERÚTGÁVA!***
*Frímerkjaarkið verður avdúkað seinni.*

Nýggj útgáva: **Teir sjey svanirnir**
Útgávudagur: 08.09.2017
Virði: 9,50 og 19,00 kr.
Nummar: FO 865-866
Postgjaldsbólkur: Smábrøv í Føroyum, 0-50 gr. og smábrøv til onnur lond, 0-50 gr.


FO 868 Royndarprent



FO 867

Nýggj útgáva: **Sepac 2017: Føroyskur knívur**
Útgávudagur: 02.10.2017
Virði: 19,00 kr.
Nummar: FO 867-868
Stødd, frímerki: 60 x 40 mm
Stødd, smáark: 80 x 60 mm
Listafólk: Martin Mörck
Prentingarháttur: Offset / stálprent
Prentsmiðja: La Poste, Frakland
Postgjaldsbólkur: Smábrøv til onnur lond, 0-50 gr.



FO 869 Royndarprent




Nýggj útgáva: **Trúbótin 500 ár**
Útgávudagur: 02.10.2017
Virði: 18,00 kr.
Nummar: FO 869
Stødd, frímerki: 40 x 30 mm
Stødd, smáark 60 x 80 mm
Listafólk: Anker Eli Petersen
Prentingarháttur: Offset
Prentsmiðja: Cartor Security Printing, Frakland
Postgjaldsbólkur: Stórbrøv í Føroyum, 51-100 gr.



FO 870-871



Royndarprent

Nýggj útgáva: **Føroysk klæðir II**
Útgávudagur: 02.10.2017
Virði: 9,50 og 17,00 kr.
Nummar: FO 870-871
Stødd: 30 x 40 mm
Listafólk: Edward Fuglø
Prentingarháttur: Offset
Prentsmiðja: OeSD, Eysturríki
Postgjaldsbólkur: Smábrøv í Føroyum, 0-50 gr. og smábrøv til Evropa, 0-50 gr.

*Verður somuleiðis givið út sum hefti við 6 sjálvklistrandi frímerkjum.*

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Mikladalur . Myndatøka: Ólavur Frederiksen . Prentsmiðja: Føroyaprent.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

/faroestamps